# Í 2 'aranum í morgin

## Petur kopierar tónleik ólógliga



Teir finnast á mongum kømurum og kjallarum kring landið, men teir trívast best í tí dulda. Teir kopiera tónleik ólógliga, vaksa um sítt fløgusavn fyri lítlar pengar og vinna pengar við at selja ólógligu kopiini til fólk. Í morgin hava vit interview við ein av teimum, sum kopierar tónleik ólógliga.



## Terji svíður enn fyri útgávuna hjá Føstufressum

Terji Rasmussen hevur í 10 ár goldið rentur og avdráttir fyri lánið, hann tók til at gera bestu føroysku tónleikaútgávuna. Hann verður liðugur at gjalda í 2003!

**og mangt annað**

# Feðgar á fløgu

*24 smá stykki eru á fløguni, ið Kristian og Mikael Blak hava givið út*

DAGFINN OLSEN

Nakað fyri jól kom fløga út, ið nevnst 24 Preludes. Kristain Blak er maðurin aftanfyri og hann leikar saman við soninum Mikael.

Feðgarnir leika 24 smærri stykki. Mikael situr sum vanligt við bassinum. Kristian likar ymisk ljóðføri: piano, urgu, harmoninum, áslátтur, Fender Rhodes og Wurlitzer el piano.

Listarliga arbeiðið handan fløguhúsan hevur Sámal Blak gjørt og Kristan Blak og Hans H. Scheel eiga myndirnar.

Kristian Blak stendur sum framleiðslustjóri á hesi fløguni, ið er tikin upp í Havnar Kirkju, á Frúutrøð og í Studio 93.

Tøkningar vóru Edvard Nyholm Debes og Ronnie Nielsen. Ole Christian Nielsen stóð fyri mastring.

Tutl stendur fyri útgávuni




*Feðgarnir Kristian og Mikael leika á fløguni 24 Préludes*

## Óbodnir gestir umborð á Saksaberg

Milum tann 23. og 27. desember 1999, hava óbodnir gestir vitjað umborð á Saksaberg, sum lá í Havn.

Ótangarnir hava brotið rút í eini hurð í stýrhúsinum. Teir hava m.a. fingið við sær neyðrakettir og bluss, fløguspælara, amboð, eitt 14" sjónvarp og video.

Bergleif Brimvík sigur av politistøðini í Havn, at hann veit ikki hvusuu er við vaktum, ella um skipið lá við bryggju ella var á skipasmiðju. Men tað tykist ikki, sum nakar vakthavnadi hevur verið umborð jóladagarnar, tá bert kann staðfestast, at innbrotið er hent millum tann 23. og 27. desember.

# Faroe Boys aftur til Íslands

*í morgin er stórt gallakvøld í Reykjavík, ið stendur í føroyskum ljósi. M.a. luttekur orkestrið Faroe Boys og teir hava ikki vitjað í Íslandi, síðani 1966*



DAGFINN OLSEN

Leygarkvøldið verður stórt føroyskt gallakvøld á Broadway í Reykjavík. Birgir Enni stendur fyri matinum, har alt gott úr havinum er á skránni.

Men forvitnisligt er, at eisini stendur á lýsingarleppanum, at Faroe Boys leika fyri dansi.

Faroe Boys tóku í sekstiárunum íslendingar á bóli. Umframt at vera millum kendastu bólkar í Føroyum, so vitjaðu teir tvær ferðir í Íslandi, 1964 og 1966, og fingu heitð „føroysku beatlarnir", ið sjálvsagt vísir til The Beatles.

### Ikki gerandiskostur

Robert McBirnie vitjaði í Íslandi í 1984, tá hann gav út plátu. Men annars er ikki ofta, at Ísland og Føroyar vitja hvør annan í tónleikasamanhangi. Ikki mangir føroyskir bólkar hava vitja í Íslandi, tó at nakrir føroyingar nú fáa sær tónleikaútbúgving har og James Olsen í 90'unumgjørdist rættiliga kendur har. Eisini Twilight hava vitjað Ísland í samband við gallakvøld. Her hava vit seinast havt vitjan av bólkinum Land og Synir. Men gerandiskostur eru tónleikavitjanir millum grannatjóðirnar ikki.

### Ikki sama manning

Tað er tó ikki heilt at skjóta beint at nevna bólkin, sum nú vitjar á Broadway, fyri Faroe Boys, tí manningin er ikki júst hin sama, sum tá Faroe Boys leikti á Tórs Café í sekstiárunum. Men tveir eru við, Robert McBirnie og Jógvan Dahl. Annars eru tónleikarar úr t.d. Robert og Vinmenn við. Fyrireikararnir halda tó vera áhugavert at vita, um fólk, sum upplivdi bólkin í sekstiárunum, fara at vitja aftur leygarkvøldið 8. januar.



# Ein átilig nationalromantisk røða

*Edmund Joensen heldur nýggjársrøðu løgmans vera eina runda og átiliga nationalromantiska røðu, sum í ov lítlan mun viðgjørdi verulig politisk viðurskifti*

JOHN JOHANNESSEN

– Nýggjársrøða løgmans var ógvuliga nógv merkt av fullveldisætlanini. Hon var ógvuliga nationalromantisk og viðgjørdi als ikki, hvørjar avleiðingar standast av, at fullveldisætlanin verður framd í verki.

Formaður Sambandsfloksins er ikki so væl nøgdur við nýggjársrøðu løgmans. Hann heldur, at hon sum heild var í so soltin.

### Serligt høvi

Edmund Joensen vísir á, at undanfarnar løgmansrøður hava verið at líkna við smáar løgmansrøður, ið verða hildnar tá tingið verður sett á ólavsøku.

Formaður Sambandsfloksins ásannar tó, at hetta árskiftið var eitt serligt høvi til at halda eina eitt sindur ørðvísi nýggjársrøðu.

– Talan var á hesum sinni eitt túsundáraskiftið og somuleiðis var talan eisini um byrjanina til túsundárið fyri kristniboðan Føroya. Tískil er sjálvsagt, at nýggjársrøða løgmans er merkt av hesum, men fyri tað haldi eg ikki, at løgmaður eigur at sleppa øllum øðrum.

Edmund Joensen sigur seg hava illgruna um, at løgmaður hevur nýtt túsundáraskiftið sum høvi fyri at sleppa undan at taka verulig aktuell mál fram í røðuni. Hetta er, eftir hansara tykki, ikki rætt. Tí ein nýggjársrøða eigur at mynda politikkin.

### Ov tjóðskaparlig

– Eg haldi, at nýggjársrøðan í alt ov stóran mun var merkt av endurtøkum av tí tjóðskaparliga tosinum, vit hava hoyrt frá samgonguni í seinastuni, uttan at víst varð á nakað ítøkiligt.

– Eitt gjøgnumgangandi tema í røðuni var, at alt ber til, bara fólkið saman setur sær nakað fyri

Henda boðskap heldur formaður Sambandsfloksins, at løgmaður væl fekk flættað inn í brotið um fullveldisætlanina. Men hann vísir á, at løgmaður gloymdi, at kreppan í áttatiárunum vísti tað øvugta.

– Kreppan skapti stór sár í Føroyska samfelagið, og tað er søgureingjan, tá løgmaður sigur, at nógv av fólkunum, ið rýmdu undan kreppuni, eru flutt heim aftur til Føroya. Veruleikin er, at 7.000 fólk fluttu úr Føroyum undan kreppuni, og talið av teimum, ið eru flutt heim aftur, er ikki meira enn 1.000 fólk. Harafturat kemur tað, at tey, ið fluttu burtur undir kreppuni vóru barnafamiljur, og sjótt er hjá slíkum at festa røtur úti í heimi, so tær ikki koma aftur.

Edmund Joensen vísir á, at vandi er fyri, at tað sama fer at henda, um fullveldisætlanin verður framd í verki. Og formaður Sambandsfloksins saknar, at løgmaður ávarar um vandar við fullveldisætlanini.

– Løgmaður lýsir í røðu síni fullveldisætlanina ógvuliga romantiskt og tosar um, at vit megna um vit standa saman. Men løgmaður kemur als ikki inn á spurningin um broytingarnar fara fram á nóg demokratiskan hátt og hvussu broytingarnar fara fram. Hetta haldi eg, at hann átti at tikið við.

### Skeiv raðfesting

Formaður Sambandsfloksins heldur tað vera rætt av løgmanni at gera vart við túsundárið fyri kristniboðan Føroya. Tó heldur hann, at hesin parturin - og aðrir partar við av røðuni - vóru í so prædikukendir, og er hetta ikki vanligt fyri nýggjársrøður løgmanna.

At løgmaður tekur tjóðskaparstíðið fram sum tað týdningarmiklasta málið seinastu hundrað árini, heldur Edmund Joensen ikki vera heilt rætt. Hann vísir á, at sama tíðarskeið fór eitt ógvuliga týdningarmikið fakfelagsstríð fram í Føroyum, og er hetta eitt stríð, ið hevur styrkt demokratiska rætt Føroyinga munandi.

– Solidariteturin í fakfelgsstríðunum kring heimin hava ment mangt eitt landið, eisini Føroyar, og tí hevur tað stóran týdning at taka hetta mál fram. Eftir mínum tykki hevur tað nevniliga havt eins stóran týdning fyri samfelag okkara, sum tjóðskaparstríðið.

Samanumtikið heldur Edmund Joensen nýggjársrøðu løgmans vera í so grunna, men hinvegin heldur hann, at hon er ógvuliga rund og tískil átilig hjá teimum flestu.

*Í dag klokkan 16 letur upp framsýning við málningum hjá Dagfinn Olsen í handlinum hjá Tutl í Gongini í Havn*



# Dagfinn sýnir list í Tutl

Tutl fór í fjør undir at hýsa list í handlinum í Gongini 3 á Kongabrúnni í Havn. Í dag klokkan 16 byrjar framsýning við málningum hjá Dagfinn Olsen. Talan er um málningar, ið eru málaðir seinastu árini.

Dagfinn hevur einamest verið frammi sum orð og tónasmiður og hevur m.a. í hesum sambandi fyri stuttum verið at hoyra sum tónleikagestur í útvarpssendingini „Fríggjadag geri eg hvat eg vil". Men hann hevur eisini fingist við at mála. Dagfinn hevur luttikið á nøkrum tónleikaútgávum og gav í 1997 sjálvur út fløgu, ið hann eisini myndprýddi.

Dagfinn hevur ikki havt stakframsýning áður, men hevur fingið málningar við á ólavsøkuframsýningina einar 2 - 3 ferðir.

Dagfinn Olsen er tann fimti í røðini av listafólkum, sum sýnir fram í Tutl. Áður hava Jens Frederiksen, Phlippe Carré, Eli Smith og Ólavur á Váli sýnt fram. Tutl hevur sett sær fyri at hýsa einum listafólki hvønn mánaða.

Í samband við framsýningina, sum letur upp í dag, fríggjadag, klokkan 16, bjóðar Tutl teim vitjandi ein kaffimunn.

Heimabio
STATOIL
Nýggir filmar hvørja viku



THE MATRIX



LOKKEDUEN



NOTTING HILL



THE MUMMY

**Leiga videofilmar á hesum støðum:**
Statoilstøðin í Gundadali tel. 314770
Statoilstøðin í Kollafirði tel. 421083
Statoilstøðin í Saltangará tel. 449133
Statoilstøðin í Klaksvík tel. 457353
Statoilstøðin í Sørvági tel. 332001
Statoilstøðin í Sørvági tel. 332001
Statoilstøðin í Leirvík tel. 443360
STATOIL
*støðirnar kring landið*